# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Sum frálíður veksur hann vindin upp í ein strúk av landsynningi og um kvøldið regn. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi og stundum regn. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fyrst lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men týsdagin upp í ein strúk av útsynningi, men framvegis turt. Hitin millum 5 og 9 stig.



# Sjá tú blánar í sólskini

Verðrið var av tí fagrasta kring alt landið allan flaggdagin. Í høvuðsstaðnum var sum á Ólavsøku, tá stór mannfjøld savnaðis á Vaglinum

Merkið kom rættiliga til sín rætt flaggdagin anno 2001. Summarið hómaðist veruliga í luftini hendan dagin, har sólin frá tíðliga á morgni og út á kvøldið, meðan fløggini veittraðu í blíða lotinum.

Í hvøðusstaðnum savnaðust nógv fólk til flaggdagshaldið á Vaglinum, har Demmus Hentze, løgfrøðingur og fyrrverandi tingmaður røddi.

Røðan hjá Demmusi var ógvuliga afturlítandi. Hann nam við flaggsøguna og ymisk viðurskifti í sambandi við flaggið afturi í tíðini.

Á Vaglinum vóru eisini umboð fyri skotska tingið, og ynskti ein av hesum at bera Føroyingum eina heilsu á flaggdegnum. Hann fróddist um, at Bretland hevði havt sína ávirkan á, at føroyingar fingu egið flagg. Harafturat vísti hann á, at skotar ynskja tætt samband við Føroyar og føroyingar.

Ein rættulig hugnadagur var 25. apríl 2001 í høvuðsstaðnum. Nógv fólk á gøtuni allan seinnapartin, og møguleiki at síggja mangt forvitnisligt, millum annað ellisskúlaføt á Kongabrúnni, flaggdagsrenningа.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | ÷2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 9 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 20 |
| Malta | – |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | – |
| Sydney | 22 |
| New York | 11 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 34 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst við Hvarvið fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjakvøldið.




Lágtrýstið vestanfyri Ísland fer í landsynning suður um Føroyar og gevur eitt skifti høgætt á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/04 kl. 06⁰⁰–26/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,8°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 25/04 kl. 06⁰⁰–26/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 74,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

17. apríl: Mánin longst frá jørðini
23. apríl: Tendring
30. apríl: Fyrra kvarter
2. mai: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 27. apr | 10.19 | 22.45 | 09.19 | 21.45 | 09.34 | 22.00 | — | 12.19 | 00.54 | 13.19 | 08.34 | 21.00 | 07.34 | 20.00 | 10.34 | 23.00 | 11.34 | — | 10.04 | 22.30 | 11.19 | 23.45 |
| 28. apr | 11.09 | 23.34 | 10.09 | 22.34 | 10.24 | 22.49 | 00.45 | 13.09 | 01.45 | 14.09 | 09.24 | 21.49 | 08.24 | 20.49 | 11.24 | 23.49 | 00.00 | 12.24 | 10.54 | 23.19 | — | 12.09 |
| 29. apr | — | 12.04 | 11.04 | 23.34 | 11.19 | 23.49 | 01.34 | 14.04 | 02.34 | 15.04 | 10.19 | 22.49 | 09.19 | 21.49 | — | 12.19 | 00.49 | 13.19 | 11.49 | — | 00.34 | 13.04 |
| 30. apr | 00.34 | 13.14 | — | 12.14 | — | 12.29 | 02.34 | 15.14 | 03.34 | 16.14 | 11.29 | — | 10.29 | 23.09 | 00.49 | 13.29 | 01.49 | 14.29 | 00.19 | 12.59 | 01.34 | 14.14 |